SANSIR TEL 355 355



## Leiðari til ávísingardeildina hjá ALS

# Kom og brót upp úr nýggjum

Vilt tú vera við til at bróta upp úr nýggjum, so er eitt spennandi og avbjóðandi starv sum leiðari á Ávísingardeildini leyst at søkja.

Talan er um eitt nýtt starv á einari nýggjari deild. Høvuðsábyrgdin er arbeiðsávísing og førleikagevandi tiltøk, ið skulu bøta um møguleikan at fáa arbeiðsleys aftur í arbeiði. Gingið verður nýggjar leiðir á hesum økjum. Tín uppgáva í hesum sambandi er at menna karmarnar og seta teir í verk saman við starvsfólkunum á deildini.

Uppgávan hjá nýggja deildarleiðaranum er annars at skipa og leiða dagliga arbeiði á deildini. Tú skalt harumframt røkja samstarvið við arbeiðsgevarar, arbeiðstakarar, fakfeløg og onnur, og tað krevur ávísa ferðing kring landið.

Saman við stjóranum og deildarleiðarunum á Tryggingardeildini og Fíggjar- & fyrisitingardeildini myndar deildarleiðarin á Ávísingardeildini leiðsluna á ALS.

Starvið er fjølbroytt við nógvum avbjóðingum, og tí krevst, at deildarleiðarin hevur hóskandi útbúgving og viðkomandi royndir. Góður kunnleiki til føroyska arbeiðsmarknaðin og innlit í samfelagsviðurskifti yvirhøvur eru somuleiðis umráðandi.

Vit leggja dent á, at tú hevur góð samstarvs- og leiðaraevni. Tey, ið søkja, skulu vera frí, virkisfús og hugmyndarík og mugu hava evnini at útinna verkætlanir í verki.

Lønin verður sambært avtalu, og starvið verður sett skjótast til ber. Síðsta freist at søkja starvið er tann 27. desember 2004 klokkan 12. Umsóknir skulu stílast til Elisabeth O. Gaardbo, stjóra á ALS, sum fegin sigur tær meira um starvið á telefon 34 95 50 ella teldupost elisabeth@als.fo.

ALS

ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 18 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.

Arbeiðsloysisskipanin • Postsmoga 3022
FO-110 Tórshavn • Tel 349550 • Fax 349551
als@als.fo • www.als.fo

SANSIR TEL 355 355



## Leiðari til tryggingardeildina hjá ALS

# Tú dugir røttu leikirnar

Ert tú tann føddi leiðarin, ið hevur evnini at stíla fyri og samskipa? Telvar tú rætt, hóast nógvir leikir eru á borðinum? So er eitt spennandi starv sum leiðari á Tryggingardeildini leyst at søkja.

Tryggingardeildin umsitur vanligan arbeiðsloysisstuðul, fiskavirkisskipanina, arbeiðsloysistrygging fyri sjálvstøðug vinnurekandi, flyting millum A-kassar, farloyvisskipanina og Barsilsskipanina.

Høvuðsuppgávan hjá deildarleiðaranum verður at leiða og skipa dagliga arbeiðið á deildini. Saman við stjóranum og deildarleiðarunum á Ávísingardeildini og Fíggjar- & Fyrisitingardeildini myndar deildarleiðarin á Tryggingardeildini leiðsluna á ALS.

Starvið er fjølbroytt við nógvum avbjóðingum, og tí krevst, at deildarleiðarin hevur hóskandi útbúgving og viðkomandi royndir. Fyrimunur er, um deildarleiðarin hevur løgfrøðiligt innlit, góðan kunnleika til føroyska arbeiðsmarknaðin og innlit í samfelagsviðurskifti annars.

Vit leggja dent á tíni leiðara- og samstarvsevni. Tú hevur evnini at stíla fyri og samskipa. Tú varðveitir yvirlitið, hóast nógv hendir samstundis, samskifti er tín sterka síða, og tú dugir væl at stuðla og motivera.

Lønin verður sambært avtalu, og starvið verður sett skjótast til ber. Síðsta freist at søkja starvið er tann 27. desember 2004 kl. 12.

Umsóknir skulu stílast til Elisabeth O. Gaardbo, stjóra á ALS, sum fegin sigur tær meira um starvið á telefon 34 95 50 ella teldupost elisabeth@als.fo.

ALS

ALS hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin. Á ALS starvast í løtuni 18 fólk. Virksemið hjá ALS er í høvuðsheitum lógarásett. Ovastu leiðsluna hevur stýrið fyri ALS, sum - eftir tilmæli frá arbeiðsgevara- og løntakarafeløgunum á arbeiðsmarknaðinum - verður valt av Føroya Landsstýri.

Arbeiðsloysisskipanin • Postsmoga 3022
FO-110 Tórshavn • Tel 349550 • Fax 349551
als@als.fo • www.als.fo